# Sjómannadagurin brúkti gott agn

**Føroya Sjómannadagur fekk eina flúgvandi byrjan í Klaksvík leygardagin. Hópin av tiltøkum vóru á skránni, og tey skaptu so stóran áhuga millum manna, at millum tvey og trý túsund fólk vóru á Stongunum leygardagin**

SJÓMANNADAGUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð var skipað fyri Sjómannadegi í Klaksvík leygardagin. Tiltøk av øllum hugsandi slagi vóru á skránni, og stórur áhugi var fyri tiltakinum.

Longu tíðliga leygarmorgunin vóru sera nógv fólk á Stongunum og fylgdu við, tá ið Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, setti dagin, bjargingarbáturin Ziska kom til Klaksvíkar og Norðoya Sparikassi bjóðaði morgunmat.

Gjøgnum dagin vóru nógvar stuttligar og øðrvísi kappingar á skránni, og eisini hesum kappingunum var stórur áhugi fyri. Alt frá sjómanstaki, togtogan til egning og kelving varð at undirhalda sær við, og luttakararnir vóru bæði frískir og raskir.

Alt gekk upp á stás, men tá ið tað seint á kvøldinum fór at regna, varð dansurin á Stongunum avlýstur.

Fyrireikararnir meta, at tað vóru millum tvey og trý túsund fólk á Stongunum leygardagin, og tiltakið verður aftur um eitt ár.




*Sjómannadagurin byrjaði við, at nýggi bjargingarbáturin Ziska kom til Klaksvíkar*

*Mynd: Dávur Winther*



*Nógvar stuttligar kappingar vóru á skránni, og her snýr tað seg um at halda einum dreggi*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Millum tvey og trý túsund fólk vóru við til Sjómannadagin í Klaksvík*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Nógv flott modellskip vóru at síggja á Sjómannadegnum*

*Mynd: Brandur Petersen*




*Børn kundu eisini stuttleika sær á sjónum*

*Mynd: Bárður Lydersen*




*Bæði børn og vaks – og hundar – vóru áhugað í framsýningini av livandi fiski, krabbum, hummarum, goggum og øðrum úr sjónum*

*Mynd: Brandur Petersen*